gult cyan magenta svart



Hendur & Hugflog 2000 Søluframsýning fyri listhandverk og heimavirking

# Vørumenning og marknaðartørvur

## - tvær síður av somu sak

*Heimavirking og listhandverk hava felags áhugamál við ferðavinnuna, tá tað ræður um vøkstur í ferðavinnuni og at útvega vørutilboð til ferðafólkið*



*Nógv fólk hevði leitað sær í Tilhaldið í Tórsgøtu til fundin um gávulutir og ferðavinnu, sum nevndin fyri Hendur & Hugflog skipaði fyri hálvan juni.*

Ferðafólk vilja fegin keypa vørur, sum eru virkaðar í tí landinum, sum tey vitja. Fyri handaverksfólk hevur tað tí týdning at finna út av, hvat tað er, sum ferðamaðurin leggur dent á.

Tað eru eisini aðrir marknaðir fyri hondgjørdum vørum, sum listhandverkarar og heimavirkisfólk kunnu leggja seg eftir. Her verður hugsað um gávulutir, sum bæði privatfólk, fyritøkur og stovnar keypa í stórum tali.

Frammanfyri nevndu evni vóru á dagsskránni á fundi, sum nevndin fyri Hendur & Hugflog bjóðaði listhandverks- og heimavirkisfólk til tann 17. juni. Niðanfyri taka vit samanum nakað av tí, sum varð umrøtt á fundinum.

**Hvør skal keypa**

Framleiðarin skal fyrst gera sær greitt, hvørjir keypararnir av hansara vørum eru, ella hvørjar keyparar hann ynskir at fáa til vørurnar.

Krøvini til sjálva vøruna, innpakking, vørulýsing og annað kunnu vera heilt ymisk alt eftir um vøran skal seljast yvir diskin beinleiðis til føroyskan endabrúkara ella um vøran til dømis verður keypt av eini fyritøku, sum skal lata hana víðari sum eina gávu, kanska til ein útlending.

Tí má framleiðarin gera sær greitt, hvøjar marknaðarbólkar hann ynskir at selja til, og hvønn tørv og hvørji ynski júst hesir einastøku bólkarnir hava. Fyri sølumøguleikarnar er tað avgerandi at vøran sum heild hevur teir eginleikar, sum møguligu keypararnir leggja dent á.

Samstundis gevur henda tillagingin av vøruni til marknaðarkrøvini møguleikar fyri at fáa ein hægri prís fyri vøruna. Tað vil siga, at vit tala um eina virðisøking av vøruni, sum antin kann fremja størri sølu ella geva hægri prís, og helst bæði. Um vørumenningin ikki loysir seg, so hevur hon onga meining.

Nøkur dømi um hvørjar møguleikar tú sum framleiðari hevur fyri virðisøking av vørunum:

**Sjálv vøran**

Í nógvum førum er vøran sjálv, sum hon skal vera. Framleiðarar eiga tó regluliga at meta um, hvussu teir kunnu gera vøruna betri og snøggari, um vøran kann virkast í ymiskum variantum ella um framleiðsluháttturin kann betrast o.a.m. Tílíkt áhaldandi betringararbeiði kann bera góða frukt.

Nakað, sum framleiðarar eiga ansa eftir er, um vøran er ov meinlík fabriksgjørdum vørum. Tá verður torført at fáa hampuligan prís fyri hana. Strembast má tí eftir at geva vøruni aðrar eginleikar enn fabriksgjørda vøran. Hetta kann millum annað gerast við vali av rávøru, við formgávuni ella á annan hátt.

**Innpakking**

Innpakking kann vera ein týdningarmikil partur av søluni, serliga tá talan er um vørur til gávur.

Er talan um fyritøkur ella stovnar, sum keypa gávulutir til viðskiftafólk, kann tað vera avgerandi at vøran er í innpakningi, sum bæði ger hana meira lokkandi og einfaldari at lata víðari. Í aðrari støðu kann tað vera nóg mikið, at seljarin kann bjóða eina eskju til innpakning, um kundin ynskir tað.

Í Føroyum er eingin fyritøka, sum hevur lagt seg eftir at gera eskjur til gávulutir v.m., og framleiðarar hava tí keypt tílíkar uttanlands, men tað eru tó teir fáu.

Møguleikarnir eru óteljandi, tá tað kemur til innpakking. Hugsið tí um innpakking, sum ger eginleikarnar sjónligar, sum tú ynskir at leggja dent á við vøruni.

**Frágreiðing um vøruna**

Hvørjum tilfari er vøran gjørd úr? Er nøkur søga at siga um hetta tilfarið ? Er nøkur søga knýtt at sjálvari vøruni ella t.d. nýtsluni av henni í gamlari tíð ?

Tílíkar frágreiðingar eru við til at marknaðarføra vøruna sum nakað serligt og vísa, at framleiðarin sjálvur virðismetir vøruna. Fyri útlendingin, og tann, sum keypir gávur til útlending, hava tílíkar vørulýsingar serliga nógv at siga.

Er talan um bundið plagg: Hvussu skal tað vaskast ? Aðrastaðni er tað ikki ein sjálvfylgja, at fólk vita, hvussu ullarvørur skulu vaskast, og summi halda seg tí burtur frá ullarvørum. Ein stutt frágreiðing kann vísa, hvussu eingfalt tað í veruleikanum er, og kann tí fremja sølu í einstakum føri.

*– Vit eiga at gera meira burtur úr okkara stóru attraktiónum, sigur Annleyg Lamhauge frá Ferðaráðnum*

*Sveinur Tróndarson*

Í juni mánaði skipaði nevndin fyri Hendur & Hugflog fyri fundi í Tilhaldinum í Tórsgøtu. Eitt evni var virking av lutum til ferðavinnuna. Annleyg Lamhauge, sum starvast á Ferðaráðnum, hevði framløgu um hetta evnið.

Hon metir, at tað er neyðugt at venda sjóneykuni inneftir, og hyggja at hvat tað er, sum vit hava at bjóða.

– Vit eiga at hugsa lokalt, og tað gera vit ikki nóg nógv av í løtuni. Sum dømi kunnu vit siga, at tað finst eingin miniútgáva av Kirkjubømúrinum, og tað hóast hann er okkara størsta attraktión, sigur Annleyg.

Hetta eigur eftir hennara tykki, at fáa okkum at vakna, og hyggja nærri eftir hvat tað er vit bjóða fremmandu gestunum at hava við sær heimaftur, til minnis um ferðina her.

**Lokalar attraktiónir**

– Um vit taka Leirvík, sum dømi, so hava teir víkingatoftir har, og tað eiga teir at gera meira burtur úr í sambandi við ferðavinnuna, sigur Annleyg.

Tað kundi eitt nú verið sermerki hjá Leirvík, og eitt hugskot hevði verið at selt lutir við víkingatilknýtið við toftirnar, leggur hon afturat.

– Fara vit í Suðuroynna, so hava teir kol, og tí áttu teir at fingið meira burtur úr í ferðavinnuhøpi, sigur Annleyg.

Hennara hugskot til føroyingar er at hugsa lokalt, fyri at fáa sum mest burtur úr ferðavinnuni.

**Vera á staðnum**

– Men tað er kanska júst ein partur av trupulleikanum. Vit føroyingar seta okkum upp aftur á at bíða heldur enn at fara til ferðafólkið, har tey eru, fyri at selja okkara vøru.

Føroyingar, sum hava verið uttanlands vita, at útlendsku sølumenninir eru nógv minni smædnir enn føroysku, og her hava vit kanska nakað at læra av teimum.

– Á Eiði hava tey eina søgu um eina konjakfløsku á látrinum har. Hesari áttu eiðismenn at gjørt meira burtur úr. T. d. við at selja postkort við mynd av konjakfløskuni á, greiðir Annleyg frá.

Hóast hesi støðini eru nevnd við navni, so er tað ikki tí, at hon heldur, at tey eru verri enn onnur. Tey eru bara brúkt sum dømi.

**Eygað keypir eisini**

Umframt týdningin at leggja dent á tað lokala, so heldur Annleyg, at innpakningurin hevur stóran týdning.

Jú vakrari vøran er við innpakningi og øllum, størri er møguleikin fyri, at fremmandamaðurin keypir ein eintak heimaftur við sær.

– Tað er ikki fyri at seta niður á tey sum framleiða, men tey hugsa fyrst og fremst um framleiðsluna, meðan pakningur og annað líknandi í teirra hugaheimi ikki hevur so stóran týdning. Veruleikin er harafturímóti, at pakningurin hevur sera stóran týdning, sigur Annleyg Lamhauge, sum leggur afturat, at tað tí kanska hevði verið gott hjá framleiðarunum, at fingið eina hjálpandi hond.

**Vitja á verkstaðunum**

Nógvir av framleiðarunum sita heima á smáum verkstaðum, og hava onga útsølu. Sum við innpakninginum, so er tað ikki sølubúðin, sum kemur í fyrstu røð, men hesum eru ráð fyri.

Til dømis kundi ein møguleiki verið, at gjørt eina rundferð við ferðafólki til nakrar verkstaðir.

– Á Bornholm verður skipað fyri einum túri til listhandverkarar og steðgað verður á fýra til seks støðum. Sjálv vitjanin er ókeypis, meðan kostnaðurin fyri túrin fer til at rinda fyri buss og ferðaleiðara. Hetta átti at verið møguligt at gjørt her heima eisini. Á tann hátt fingu ferðafólk høvið til at koma í samband við framleiðararnar og samstundis at keypa vørur teirra, heldur Annleyg.

gult cyan magenta svart




Føroya størsta
úrval í seymitilfari

Til dømis hava vit:
Repsbond – belægningsbond – bummulls og silki
skrábond – silkibond – ullbond – pyntubond – beltabond –
svart floyalselastik til beltir í trimum breiddum – anoraksnórar –
silkisnórar – frynsar – festonblondir – tráðblondir – ymiskan tráð til
seymimaskinur og Overlockmaskinur – kinesartráð –
ullint og mercisera stoppigarn – elastiktráð – nógv ymisk
sløg av lynlásum, bæði heil og deilbar í nylon og metal –
1000 tals sløg av knappum í øllum støddum og litum –
trykknappar – snapulhektir – niðurdeilshektir og buksuhektir –
vestaspennir – yvirallsspennir – elastik í fleiri breiddum –
sokkastroppar – ermabløð – lappar at bøta við – nógv
ymisk merkir at seta uppá klæðir – pennar at merkja klæðir við –
nálir til seymimaskinur – spolar til seymimaskinur – stórar stoppinálir
og aðrar nálir – fingurbollar – krit – kalkerpappír – mynsturpappír –
BURDA mynstur – MULTISNIT mynstur – saksar, eisini storkasaksin –
Vlieseline – Vliesofix – fóurtoy – ein hóp av nýmótans meturvørum.
Eisini hava vit nógvar góðar restir.

SP/F MARJUN HEIMÁ
C. Ployensgøta 4 • 100 Tórshavn
Tel. 31 25 31 • Fax 31 23 19

Sosialurin - 311820



Bundnir
og
tøvdir
møttlar



Bindikjallarin
v. Malan Helgadóttir
tlf. 332337 - 333355
Miðvágur

Sosialurin - 311820



Hondsmí›ja silvur



til tann
føroyska
búnan
•
smí›ja á
egnum
verksta›i

NIELS L. ARGE
HANDMADE JEWELLERY
ESTABLISHED 1932
Kongabrúgvin • Tel. 311731 • Fax 318532

Sosialurin - 311820



Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin
Størstur í síni stødd – við størsta dieselmotori – til besta prísin
ROYN HENDAN
SERA VÆLUMTØKTA BILIN

KIA
CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar

Familju - camping - firmabilur- og "mini-bussur"

Fæst eisini sum vøruvognur






Multibilurin
til einhvørja loysn
Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútar í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í 8 ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós framman, kúfangarar í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinum v.m.
3 ára garanti/100.000 km. garanti




Rætti bilurin til mong endamál.
–Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.

D. B. Bilar J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 310600

Sosialurin - 311820